# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Virðini, sum hvurvu

Tey, sum minnast valstríðið seinast, minnast eisini, at knappliga uttan at nakar varnaðist komu tey sonevndu bleytu virðini upp í valstríðið mest sum burtur úr ongum. Hóast onkur mutlaði um tunnlar og onnur hørð virði, so fingu hesir ikki fótin fyri seg. Knappliga talaðu øll um bleyt virði, men tað løgna var, at eingin av hesum í roynd og veru greiddi veljarunum frá, hvat ein hugsaði um, tá talað varð um bleyt virði. Hvør var tað í grundini, sum kom við øllum tosinum um tey bleytu virðini? Uttan at hava granskað evnið, so bendir alt á, at tað var eingin annar enn ungi alvi Fólkafloksins, Jørgin Niclassen, sum fyrstur var at tala bleyt virði. Áhugavert, tí bleyt virði er kanska ikki tað fyrsta, ið rennur einum til hugs, tá ein hugsar um Fólkaflokkin. Eftirfylgjandi komu valevni kropp á kropp og lovaðu at raðfesta bleytu virðini, um júst flokkur teirra vann álit.

Hvat meintu hesi valevni í grundini við hugtakinum bleyt virði? Í einum valstríði ræður eitt serstakt lag, ein ávísur stemmningur, sum ger, at vit kanska ikki hugsa so djúpt um hugtøkini, ið fúka um oyruni. Soleiðis mundi vera við bleytu virðinum. Tað er lítið hugsandi, at heitið bleyt virði merkir tað sama fyri eitt nú eitt miðflokkavalevni sum fyri eitt nú eitt tjóðveldisella javnaðarvalevni. Tað er tó rættiliga greitt, at summi valevni hugsaðu um almanna- og heilsumál og umhvørvi, ud børn og ung, meðan onnur talaðu um útbúgving og gransking, og uppaftur onnur valevni talaðu um mentan og list.

Sostatt ber illa til at staðfesta nágreiniliga, hvat tað var, sum hátíðarliga varð lovað, tá allir flokkar í valstríðnum lovaðu at raðfesta bleytu virðini fremst í komandi valskeiði. Hinvegin kunnu vit tó uttan víðari staðfesta, at hugsað varð um alt annað enn tunnlar, skattapolitikk, asfalt og betong. Tað ber eisini til at staðfesta, at politiska orðaskiftið og toganin eftir valið hevur snúð seg um alt annað enn bleytu virðini. Tunnlar og fiskidagar og búskapur hava sett dagskránna og lítið hevur verið talað um bleyt virði, uttan at onkur flokkur hevur rósað sær av nøkrum bleytum verkætlanum, sum Jógvan á Lakjuni longu hevði sjósett, áðrenn hann fór frá. Um skamma stund fara samráðingarnar um fíggjarlógina 2009 at byrja í álvara. Vit hava minnilutastjórn og tískil hava nú allir flokkar, sum í valstríðnum lovaðu at raðfesta bleyt virði, høvi at gera sína ávirkan galdandi. Flokkarnir hava nú høvið at vísa, hvat teir meina við bleyt virði og teir hava høvið at prógva, at teir megna at halda givin lyfti. Búskaparliga er so smátt farið at reka í móti. Búskaparligt mótrák verður vanliga í Føroyum nýtt sum umbering fyri ikki at satsa uppá bleyt virði. Tað skal tí ikki vera nøkur politisk bloyta, sum skal fremja gyltu vallyftini um bleyt virði.

**Sosialurin**

# Fróðskaparsetrið hevur fingið nýggja lóg



**MAGNUS DANIELSEN**
Professari

Fríggjadagin 1. august 2008 varð nýggj lóg sett í gildi um Fróðskaparsetur Føroya. Vert er at hefta seg við, at hetta er lóg um Fróðskaparsetrið sum stovn og ikki ein "yvirordnað" universitetslóg, sum t.d. er galdandi í Danmark.

Lógin myndar eina stóra broyting fyri universitetsarbeiðið í Føroyum. Hon ber í sær eina samansjóðing av "gamla" Fróðskaparsetrinum, Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya og Læraraskúla Føroya í ein stovn og kemur helst at umfata fleiri fakøki sum frálíður. Hon kemur tí at vera karmur um universitetsgransking og universitetsútbúgvingar her á landi í framtíðini.

**Frá sjálvsognarstovni til almennan stovn**
Nýggja lógin hevur týdningarmiklu broytingina við sær, at Fróðskaparsetrið frá at vera ein sjálvsognarstovnur er vorðið ein almennur stovnur.

Nýggja lógin fyri Fróðskaparsetur Føroya er í stóran mun lík donsku universitetslógini í uppbygging, men tað eru kortini heilt avgerandi munir. Føroyska lógin staðfestir Fróðskaparsetur Føroya sum ein almennan stovn, meðan danska universitetslógin staðfestir donsk universitet sum "sjálvsognar stovnar innan karmarnar av almennari fyrisiting". Tí kann sigast, at Fróðskaparsetur Føroya í útgangsstøðinum verður stýrt politiskt, meðan donsku universitetini í sínum vísindaliga arbeiði prinsippielt eru óheftir av statsmaktini.

Lógin ásetir kortini í §1, at Fróðskaparsetur Føroya skal virka óheft av politisku skipanini, har hetta er ásett í lógini. Men í lógini eru bert fáar ábendingar um óheftu støðuna við tað, at sjálvt stýrið er politiskt valt. Í §2 er ásett, at Fróðskaparsetrið hevur granskingarfrælsi, og at landsstýrismaðurin kann ikki geva Fróðskaparsetri Føroya tænastuboð viðvíkjandi teimum uppgávum, ið eru fevndar av §2, t.e. at inna gransking og at veita frálæru sambært neyvari reglum, ið verða ásettar við løgtingslóg ella kunngerð (frá landsstýrismanninum). Men tað er ikki ásett, at hvørt vísindafólk hevur granskingarfrælsi eins og tað t.d. er ásett í donsku universitetlógini.

Men í §3 stendur, at landsstýrismaðurin viðger uppskot frá Fróðskaparsetrinum um, hvørji útbúgvingartilboð skulu vera í hvørjum fakøki, og skipar fyri eftirmeting av stovni og útbúgving sum grundarlag fyri tillagingum í kørmunum. Landsstýrismaðurin ásetir neyvari reglur fyri útbúgving og útskriving av prógvum.

**Fróðskaparsetrið hevur stýri við uttanseturs meiriluta, valt av landsstýrismanninum**
Tað er ikki ókent í øðrum londum, at universitet hava stýri við meiriluta av uttanífrá komandi stýrislimum. Í donsku universitetslógini er staðfest, at donsk universitet skulu stýrast eftir hesi skipan, men tað er rættiliga sjáldsamt, og fyrikemur ikki í Danmark, at stýrið verður valt av ministaranum.

Fróðskaparsetur Føroya hevur sambært nýggju lógini stýri við 7 limum við uttanseturs meiriluta, allir tilnevndir av landsstýrismanninum. Meirilutin (4 limir) verður tilnevndur uttaneftir eftir landsstýrismansins avgerð. Umframt tilnevnir landsstýrismaðurin 2 limir eftir tilmæli frá starvsfólkunum á Fróðskaparsetur Føroya, umfatandi bæði vísindaligt starvsfólk, skrivstovufólk, laborantar og onnur hjálparfólk, og 1 lim eftir tilmæli frá teimum lesandi. Hesi tilmæli av umboðum fyri starvsfólk og lesandi fara fram eftir nærmari reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur (§10).

Stýrið setir síðan rektara í starv. Rektarin setir dekanar í starv fyri megindeildirnar, ið røkja ymisku fakøkini. Eingi starvsfólkaráð við stýrandi myndugleika eru. Dekanur kann seta ráðgevandi lestrarráð eftir tørvi. Rektari kann seta akademiskt ráðgevandi ráð.

Mótvegis hesum hevði sjálvsognarstovnurin Fróðskaparsetur Føroya sambært gomlu lógini eitt Setursráð sum hægsta myndugleika. Tað var samansett av rektara og formonnum í megindeildunum á setrinum. Megindeildir vóru tríggjar í tali í trimum ymiskum fakøkjum. Hesar deildir høvdu leiðslur, valdar av vísindaliga starvsfólkinum, men høvdu vald umboð fyri onnur starvsfólk og studentar eisini. Rektarin var valdur millum vísindaliga starvsfólki av megindeildarráðunum. Sostatt virkaði sjálvsognarstovnurin Fróðskaparsetur Føroya uttan nakra beinleiðis politiska íblanding.

**Hvussu er á donsku universitetunum**
Á donskum universitetum eru stýrini eisini samansett við meiriluta av uttanífrá komandi limum; men ongir limir verða valdir ella tilnevndir av ministaranum. Limirnir verða valdir sambært viðtøkum, sum eru ymiskar fyri ymisku universitetini. Fyri at tryggja óbrotna framhaldið (kontinuitetin) fara ikki allir stýrislimir frá ísenn.

Keypmannahavnar Universitet og Aalborg Universitet hava viðtøkur, har stýrið er samansett av 3 av starvsfólkunum valdum limum og 2 av studentunum valdum limum. Umframt verða uttanífrá komandi limir valdir av samlaða stýrinum, t.e. stýrið er sjálvsupplerandi.

Á Syddansk Universitet og á Danmarks Tekniske Universitet eru "representantskab", ið velja uttanífrá komandi stýrislimirnar. "Representantskab" hevur sjálvt bert uttanífrá komandi limir. Teir verða valdir eftir serstakum reglum, ið eru ymiskar fyri hvørt universitetið, men óheft av ministaranum, og sum tryggja eina breiða fakliga, samfelagsliga og vinnuliga umboðan.

Ministarin hevur sostatt onga ávirkan á valið og hesa framferðina av tilnevningum av nýggjum stýrislimum.

**Gott við nýggjari lóg fyri Fróðskaparsetur Føroya**
Eingin ivi er um, at Føroyar trongdu til eina breiðari og nútímansgjørda universitetslóg. Viðtiknað lógin kann uttan iva nøkta nakrar av teimum spurningunum, sum eru av týdningi í sambandi við at ala ein vísindaligan hugburð í vinnuligum, samfelagsligum og mentanarligum samanhangi og harvið bera framburð Føroya fólki at frama. Eg vóni at hetta endamál verður rokkið.

**Spurningur kann setast við politisku stýringina og avtøku av sjálvsognarstovni**
Spurningur kann tó setast við, um tað er heppið við beinleiðis politiskari stýring, har landsstýrismaður einsamallur í prinsippinum hevur so stóra beinleiðis ávirkan á gransking og hægri undirvísing, ið hann sum oftast ikki sjálvur er serkønur í. Eisini er tað vágaligt at avtaka ein sjálvsognarstovn uttan hóvasták. *Hvar eru ognir "gamla" Fróðskaparseturs Føroya nú, eru tær ognartiknar?*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.